# Ferðavinna

*– lokalar skipanir og samskipan –*



April 2024

# Inngangur

Føroya Landsstýri hevur gjørt av, at vit skulu menna ferðavinnuna í Føroyum. Tað er tí eisini Føroya Landsstýri, ið hevur ábyrgd av at tryggja, at ferðavinnan hevur neyðugu karmarnar at virka undir. Visit Faroe Islands hevur uppgávuna at marknaðarføra Føroyar sum ferðafólkaland og at seta í verk menningarátøk innan fyri teir karmar, sum løgtingið hevur samtykt. Kommunurnar eru lokalu myndugleikarnir við heimildunum at raðfesta, menna og skipa egin øki í ferðavinnuhøpi.

Til at skapa samanhang millum yvirskipaðar ætlanir og lokalar grundvallir er neyðugt at hava eina felags menningartilgongd, sum kommunur og land skipa síni ferðavinnumál eftir, og sum kann binda saman ynski um ferðavinnulandið Føroyar og tað, økini hvørt sær hava og vilja bjóða vitjandi.

Visit Faroe Islands veitir stuðul og setir í verk landsfevnandi verkætlanir, menningarátøk og førleikamenning fyri vinnu og kommunur. Visit Faroe Islands er ikki ein myndugleiki við formligari avgerðarheimild um ferðavinnu lokalt, tí eru ætlanir treytaðar av samstarvi við lokalar myndugleikar og onnur, ið varða av. Skal hetta arbeiði vera ein samanhangandi tilgongd, ræður tí um, at allir partar kenna og viðurkenna sínámillum uppgávu- og ábyrgdarbýtið, at samstarvspallar verða skipaðir, og at allir partar styrkja seg og taka á seg sín lut í heildini.

Visit Faroe Islands, kunningarstovur og kommunufelagið hava í fleiri umførum umrøtt bygnað og ábyrgdarbýtið. Hin 10. november 2022 beyð Visit Faroe Islands tí øllum kommunum og kunningarstovum til fundar at umrøða møguleikar í ferðavinnuni og tær avbjóðingarnar, ið eru við verandi bygnaði. Sum úrslit av umrøðuni á fundinum tók Visit Faroe Islands stig til saman við Kommunufelagnum og kunningarstovunum at lýsa og viðgera verandi lokalu skipanir og uppgávur, sum tær eru í ymisku pørtunum í landinum, og hvørji stig til broytingar og ábøtur neyðugt og skilagott er at gera.

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur** 2

1. **Arbeiðssetningur og arbeiðsgongd** 4
    - 1.1 Arbeiðssetningur 4
    - 1.2 Arbeiðsgongd 4
2. **Samandráttur og tilmæli** 6
3. **Verandi skipanir og virksemi í kommununum** 9
    - 3.1 Uppgávur 9
    - 3.2 Ferðavinnuskipanir í kommununum 11
    - 3.3 Kostnaður 16
    - 3.4 Samanumtøka, verandi virksemi í kommununum 17
4. **Uppskot til batar og broytingar** 19
    - 4.1 Sterkari kommunalur grundvøllur 19
    - 4.2 Samskipa ferðavinnuætlanir og -átøk 21
    - 4.3 Uppgávu- og ábyrgdarbýtið 22
    - 4.4 Fígging 23
    - 4.5 Samanumtikið um batar og broytingar 25

# 1. Arbeiðssetningur og arbeiðsgongd

## 1.1 Arbeiðssetningur

Arbeiðssetningurin, ið settur varð, var í tveimum:

**1.** At lýsa verandi støðu við denti á bygnaðarligu loysnirnar lokalt í dag:

a. Hvørjar eru uppgávurnar?
b. Hvussu eru skipanirnar í ymisku økjunum í landinum?

**2.** Saman við einum tilvísingarbólki viðgera bygnaðin og leggja dent á at fáa greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti á ymiskum bygnaðarstigum, undir hesum:

c. At styrkja og menna ein bygnaðarligan grundvøll fyri kommunala partin av ferðavinnuni.
d. At styrkja samstarv um menning og tænastur.
e. At samskipa kommunalu partarnar, so at Føroyar sum ferðavinnuland hóast fjølbroytni eisini upplivist sum ein samanhangandi eind.

Undir hesum eisini viðgera, hvussu til ber at gagnnýta stuðulin til menning, karmar, infrakervi, upplýsing v.m. við størstu nyttu lokalt og fyri landið.

## 1.2 Arbeiðsgongd

Arbeiðið hevur verið skipað við einum tilvísingarbólki, sum VFI setti at geva arbeiðinum íblástur, fáa til vega neyðuga vitan og viðgera uppkøst til evni sambært arbeiðssetninginum.

Tilvísingarbólkurin umboðaði VFI, Kommunufelagið og kunningarstovurnar. Hetta so trygd er fyri, at fakligi kunnleikin er væl grundfestur í arbeiðinum, og áhugamálini umboðað.

Umboðini í tilvísingarbólkinum vóru:

Jóhan Pauli Helgason fyri VFI
Eyðun Christiansen fyri Kommunufelagið
Hans Kári Vang fyri Kommunufelagið
Marjun Niclasen fyri kunningarstovurnar
Tordis K. á Rógvi Biskopstø fyri kunningarstovurnar
Ráðgevi var Ingibjørg Berg, Metis

Vit hava bert yvirskipað og landsfevnandi hagtøl fyri ferðavinnu í Føroyum. Tí hevur ikki borið til at greina neyvt, hvussu ferðavinnan ávirkar ymisk øki og kommunur í landinum. Vit hava í staðin gjørt eina lýsing av bygnaði, uppgávum og játtanum við støði í samrøðum við nakrar kunningarstovur og kommunur og annars íkast og upplýsingar frá tilvísingarbólkinum.

Fyrstu fundirnir í tilvísingarbólkinum vóru við støði í arbeiðssetninginum at umrøða verandi støðu, umstøður, møguleikar og ynski. Síðani gjørdi Metis so hvørt upplegg til tilvísingarbólkin at taka støðu til og umrøða – fyrst í smærri bólkum um ávís evni, síðani allur tilvísingarbólkurin saman, til vit móti endanum funnu endaliga leistin og samdust um tilmælini í hesi frágreiðing.

Drúgvastu umrøðurnar vóru um bygnaðin og møguleikan formliga at skipa kommunal samstørv um ferðavinnu uttan at gera seg inn á kommunala sjálvræðið. Nøkur upplegg vórðu í hesum sambandi viðgjørd um møguleikar fyri formliga áløgdum samstørvum, skipanir, ið eggja til sjálvboðin samstørv, og meira miðsavnaðar hættir at samskipa ferðavinnu í Føroyum.

Kommunala landslagið og ofta avmarkaði hugurin at samstarva um ferðavinnu gjørdu tó saman við tí veruleika, at ferðavinna sum er fyllir lítið og einki í raðfestingunum hjá nógvum kommunum, at umrøðan fyrst og fremst fór at snúgva seg um at styrkja grundvøllin hjá kommununum heldur enn kommunal samstørv – bæði myndugleikauppgávur og møguleikan at menna tænastur og karmar.

Nakað av umrøðu hevur verið um bæði uppgávur, markamót og samstarv millum land og kommunur, og hvussu betri samanhangur fæst ímillum lokalu raðfestingarnar og yvirskipaðar strategiir hjá landinum.

Umrøðan um stuðulsskipanir og inntøkur til tær hevur eisini fylt nakað í arbeiðinum. Eisini her hava fleiri uppskot verið viðgjørd, sum bæði kundu styrkt menningina lokalt, sammenningina millum kommunalu økini, og hvussu býtið millum ymisku økini i landinum átti at verið.

Tíðarætlanin, sum upprunaliga varð sett, helt tíverri ikki, men afturfyri fingu vit eina arbeiðstilgongd, sum vónandi hevur borið við sær, at ymisku partarnir í tilvísingarbólkinum (kommunur, kunningarstovur og VFI) skilja umstøðurnar hvør hjá øðrum nakað betur, enn tey gjørdu frammanundan, soleiðis at sannlíkindini fyri samstarvi og sammenning eru vorðin betri.

## 2. Samandráttur og tilmæli

Til ber at býta virksemið hjá kommununum í tríggjar høvuðsfunktiónir: Menning, tænastur og kunning.

Kommunurnar hava valt at skipa seg ymiskt viðvíkjandi ferðavinnu: Vit hava kommunalt, felagskommunalt, privat og útveitt virksemi, sum er skipað í kunningarstovur, menningareindir og/ella kunningardiskar; og vit hava ferðavinnu sum málsøki skipað saman við øðrum kommunalum málsøkjum í kommunalu umsitingunum.

Alment kunnu vit siga, at talan er um smáar umsitingareindir við nógvari útskifting í starvsfólkahópinum. Hetta ger tað trupult at skapa trivnað og kontinuitet. Hesin bágin sær út til at vera uttan mun til skipan.

Samrøðurnar, vit hava havt við starvsfólk í kunningarstovunum, geva okkum tó ábendingar um, at kommunalu skipanirnar geva eitt ávíst støðufesti, tryggari setanarviðurskifti og størri frið um uppgávurnar, m.a. tí at atgongd er til hjálparfunktiónir í kommununum og umsitingarligt umhvørvi. Privatu og felagskommunalu kunningarstovurnar tykjast hinvegin at hava eitt nakað natúrliga tættari samband við aktørar í vinnuni.

Økini uttan fyri høvuðsstaðarøkið hava tað yvirhøvur tyngri bæði fíggjarliga og umsitingarliga, eisini tí at fáir fyriskiparar og veitarar eru at lyfta menningar- og kunningaruppgávurnar saman við kunningarstovunum og samskiparunum, og umsitingareindirnar eru í sjálvum sær fámentari.

Hóast upphæddin, ið verður játtað til innlendis ferðavinnu tilsamans, tykist stór, so er hon smábýtt á fleiri øki, og eingin miðvís ætlan tykist at vera fyri menning móti felags málum í kommunalum høpi. Hetta hugsa bæði VFI og starvsfólk í ferðavinnuni kann samskipast betur, soleiðis at meira fæst burturúr.

Tað er ymiskt, hvønn tørv kommunur hava at skipa seg viðvíkjandi ferðavinnu. Tað er tí eisini ymiskt, hvussu tær hava skipað seg og samskipa seg higartil. Har kommunur hava valt at samstarva, er eisini ymiskt, hvussu samstørvini eru skipað, hvussu víðfevnd tey eru, og hvussu tey rigga. Tað er eisini ymiskt, hvussu kommunur raðfesta ferðavinnu. Tí er eingin felags kommunalur leistur at skipa ferðavinnu.

Tó eru myndugleikauppgávur, sum kommunur – einsæris ella saman – hava skyldu til at røkja, og í økjum við nógvum ferðavinnuvirksemi eru hesar uppgávur í sambandi við ferðavinnu meira áleikandi enn í økjum við minni virksemi. Neyðugt er, at kommunurnar fáa røttu amboðini at røkja hesar uppgávur munagott.

Tá ið vit í hesum arbeiði hava umrøtt arbeiðsuppgávur, menning og møguleikar fyri framburði við kunningarstovur, eru nógv á einum máli um, at okkurt slag av samskapan og heild skal til, skal lokala menningin veruliga gera mun, og starvsfólk trívast í teimum skipanum, sum eru.

Umboðini í fylgibólkinum eru eisini samd um, at okkum tørvar effektivari og miðvísari menningartilgongd við ítøkiligum átøkum, ið er væl kjølfest í skipaðum samstarvi millum kommunur og millum land og kommunur. Við støði í eini felags ferðavinnuætlan og málum, sum hava undirtøku frá bæði landi og kommunum, hevði borið til at brúkt bæði stuðulsupphæddina hjá VFI og kommunalu játtanirnar miðvísari og meiri skipað.

## Vit hava samanlagt hesi sjey tilmæli:

At styrkja kommunala grundvøllin er neyðugt at:

1. Við lóg at geva kommununum fleiri amboð at útinna sín myndugleika, t.d. rættin til á skipaðan hátt at taka gjald fyri tænastur so sum parkering, vatn, ruskmóttøku v.m. frá ferðavinnufyriskiparum og veitarum ella beinleiðis frá ferðafólki og vitjandi.
2. Kommunur við serstøkum atdráttum og kommunur, sum eru í holt við at skipa sær ein grundvøll fyri ferðavinnu, eiga harumframt at fáa fíggjarligan stuðul at skipa viðurskiftini á staðnum, soleiðis at bæði lokalu íbúgvarnir, aktørar í vinnuni og vitjandi hava góðar og tryggar umstøður.

At tryggja javnari ferðavinnumenning í og millum kommunur er neyðugt at:

3. Skipa greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti í trimum stigum: 1) land, 2) kommunur og 3) felags ábyrgd.

4. Kommunurnar gera í fyrsta lagi saman við borgarum, ognarum og aktørum í vinnuni sínar ætlanir fyri ferðavinnu í kommununi/økinum. Síðani skipa kommunurnar seg í eitt politiskt og fyrisitingarligt samstarv undir Kommunufelagnum, har tær saman seta út í kortið og raðfesta, hvørji menningarátøk í ferðavinnuni samanlagt eiga at verða gjørd.



5. Skipa samstarv millum Kommunufelagið og Visit Faroe Islands við tí endamáli at samskipa ætlanir, mál og raðfestingar hjá landinum og kommununum. Úrslitið eigur at vera ein felags innlendis ferðavinnuætlan, ið raðfestir, hvørji menningarátøk skulu setast í verk kring landið, og hvussu tey skulu fíggjast.

6. Meiri peningur kemur í skipanina, so hon kann gera veruligan mun. At fíggja hetta mæla vit til, at ferðavinnugjald á ferðafólk, sum koma til landið, óskert fer til at menna og skipa ferðavinnuna.

7. Sum útgangsstøði at varðveita krónu fyri krónu meginregluna fyri stuðul frá landinum til átøk í kommununum, men at tað eisini við støði í eini felags innlendis ferðavinnuætlan skal bera til at eyðmerkja ein part av stuðlinum til:

    - Serstøk ferðamál í landinum.
    - Serstøk ferðavinnuevni/-tema – í økjum ella fyri landið alt.
    - Samstarvsfremjandi verkætlanir tvørtur um kommunumørk.

# 3. Verandi skipanir og virksemi í kommununum

## 3.1 Uppgávur

Tá ið Visit Faroe Islands í 2012 setti nýggja kós fyri føroyska ferðavinnu, broyttust krøvini til kommunurnar eisini. Sum ferðavinnan vaks, broyttist áherðslan, sum nógvar kommunur høvdu havt á ferðavinnumenning og -tænastur í økjunum, og politiski áhugin fyri ferðavinnu sum vinnuvegi við vakstrarmøguleikum øktist so líðandi í fleiri kommunum. Ein greið ábending um hetta er, at onkrar kommunur fluttu málsøkið „ferðavinna" úr mentanarnevndini í vinnunevndina, játtaðu pening til at menna ferðavinnu og settu starvsfólk burturav at taka sær av málsøkinum.

Kommunur høvdu tó áðrenn tað kunningarstovur, sum vóru bygdar upp um ein kunningardisk, sum møtti gestum og borgarum persónliga á staðnum og kunnaði um tað, sum gekk fyri seg í økinum. Fleiri kunningarstovur vórðu riknar av økisferðavinnufeløgum, sum kommunur í økjunum vóru saman um, og sum fingu stuðul frá landinum.

Kunningin til ferðafólk hevur hesi seinastu árini flutt seg alsamt meiri yvir á heimasíður og sosialar miðlar, tó at onkrar kommunur framvegis eisini hava kunning á staðnum. Í dag taka kommunurnar – fyri tað mesta gjøgnum kunningarstovurnar – virknan lut í at menna ferðavinnuna, seta nýggjar dagsskráir og marknaðarføra kommununa. Harumframt taka kunningarstovur virknan lut í arbeiðinum at tæna borgarum, handils- og vinnulívi á staðnum og at samskipa og kunna um tiltøk og virksemi í kommununum.

### Høvuðsfunktiónir

Flestu av teimum stóru og miðalstóru kommununum hava okkurt slag av skipaðum ferðavinnuvirksemi, sum tó er rættiliga ymiskt; og tá ið vit hava spurt kunningarstovurnar um uppgávurnar, sum eru í sambandi við ferðavinnu, fáa vit eisini fjølbroytt svar, sum vit her bólka í tríggjar høvuðsfunktiónir: kunning, menning og tænastur.

- **Kunningar„diskur"** (tourist information center)
  Ein kommunal, felagskommunal ella privatrikin móttøka, sum antin hevur ein kunningardisk á staðnum, sum upplýsir og útflýggjar kunningartilfar, og/ella er virkin á netinum við heimasíðu og samskiftir við ferðafólk og vitjandi á sosialum miðlum.

- **Menningar- og tænastueind**
  Ein kommunal, felagskommunal ella privatrikin funktión, sum mennir/kveikir tænastur og aktørar, skipar og samskipar átøk og tænastur t.d. í sambandi við festivalar og onnur mentanartiltøk, ráðstevnur, MICE, cruise v.m.; ger kunnandi tilfar, marknaðarførir og ráðgevur kommunurnar um møguleikar, karmar, infrakervið v.m.

Ein kunningarstova er ofta skipað sum bæði kunningardiskur, menningar- og tænastueind, men summar eindir hava bara eina ella tvær av hesum funktiónum.

## Hvussu verða uppgávurnar raðfestar?

Skal ferðavinna mennast sum vinnuvegur, er avgerandi, at fyriskiparar eru, sum veitarar kunnu venda sær til eftir ráðum, vegleiðing og hjálp at menna, skipa, marknaðarføra og selja vørur og tænastur til ferðafólk og onnur vitjandi. Tess fleiri fyriskiparar eru, tess betur liggur fyri at lyfta uppgávuna, og her er støðan ymisk í landinum. Ymiskt er tí eisini, hvussu nógv liggur á kunningarstovunum at lyfta og fremja.

Tá ið vit spyrja starvsfólk á kunningarstovunum, siga tey, at lutfalsliga nógv orka fer til at upplýsa og kunna, og at hjá fleiri er orkan avmarkað til at menna, framleiða tilfar og marknaðarføra økið/kommununa. Í tann mun, tað ber til, verða hesar uppgávur oftast lagdar í vetrarhálvuna. Í kommunum, har eingin kunningardiskur ella samskiftisfunktión annars er, er størri áherðsla á ferðavinnumenning, tó at lítla starvsfólkaorkan ger arbeiðsumstøðurnar truplar – talan er sum oftast um einans eitt ella parttíðarsett starvsfólk.

> *'Fleiri royndir eru gjørdar at fáa í lag økissamstørv um átøk og uppgávur, men tað er orkukrevjandi, og viljin til at samstarva millum kommunur er ofta merktur av, at kommunurnar raðfesta ferðavinnu ymiskt, og at lítil starvsfólka- og fíggjarorka er at arbeiða við. Í teimum flestu samrøðunum, vit hava havt við starvsfólk í ferðavinnuni, er ynski um meira samstarv í økjum; men skal hetta bera til, krevst størri politiskur vilji og fíggjarlig raðfesting enn í dag.'*

Uppgávuna at skipa fyri tiltøkum fyri kommunurnar halda tey flestu vera hóskandi og samstundis gevandi fyri annað virksemi, m.a. tí at sambandið við kommunu og borgarar hevur stóran týdning, og tiltøkini ala ofta til sín fleiri vitjandi.

## 3.2 Ferðavinnuskipanir í kommununum

Av tí at virksemið er so ymiskt kring landið, eru bæði hugur og tørvur hjá kommununum at skipa og samskipa ferðavinnu eisini ymiskir. Tær flestu stóru og miðalstóru kommunurnar hava onkra skipan, men fleiri kommunur hava higartil einki serstakt gjørt.

> *'Felags fyri allar kommunur, sum hava okkurt slag av ferðavinnuskipan, er, at talan er um sera smáar umsitingareindir, har starvsfólkaorkan er sperd og útskiftingin stór. Í samrøðum við starvsfólk í kunningarstovum kring landið kemur fram, at tað serliga eru óskipaðar arbeiðsumstøður og ótrygg – ofta lítil – fíggjarorka, sum gera, at starvsfólk mangan ikki trívast og støðast. Hóast spennandi eru uppgávurnar ofta ósamanhangandi, lítið skipaðar, vaksandi og nógvar í senn. Væntanir og mál eru ógreið, og ofta eru eisini uppgávur, sum ikki hoyra heima í eini kunningarstovu. Hetta setir tí krøv til kommunur ella nevndir/stýri og leiðslur um at taka støðu til, hvørjar arbeiðsuppgávur kunningarstovan eigur at hava – nú og frameftir.'*

Umsitingarligir karmar – um tað er ein kunningarstova ella annað slag av fyriskipan – hava eisini stóran týdning fyri arbeiðsumstøðurnar og trivnaðin hjá starvsfólki, bæði í fakligum og sosialum høpi og viðvíkjandi greidleika, har markamót er við aðrar kommunalar uppgávur.

Kommunalu myndugleikauppgávurnar í sambandi við ferðavinnu eru í øllum kommununum skipaðar sum partur av myndugleikauppgávunum annars, t.v.s. at býarskipan, ferðsla, tilbúgving og tekniskar veitingar eru partur av virkseminum á eini tekniskari fyrisiting/deild, men mentan og upplivingar eru partur av eini trivnaðar- ella mentanarfyrisiting/-deild. Ikki allar kommunur eru tó tilvitaðar um eisini at hugsa hesar uppgávur í ferðavinnuhøpi, sí meira um hetta í parti 4.1.

### Kommunalar skipanir

Ein kommunal skipan er sum útgangsstøði skipað sum ein eind við tilvísing til ein leiðara í kommunalu fyrisitingini. Kommunustýrið hevur evstu ábyrgd av virksemi og fígging.

## Í dag eru ymiskir kommunalir skipanarhættir:

- Kommunalur stovnur (kunningarstova / tourist information center) við serskildari játtan og starvsfólki/starvsfólkum í serskildum hølum, sum taka sær av kunning og sølu og sum oftast eisini meira og minni av menning.

- Partur av kommunalari umsiting (menningareind) – ofta eitt starvsfólk, sum hevur ábyrgd av at menna og skipa ferðavinnuvirksemið í kommununi.

- Partur av kommunalari umsiting – eitt starvsfólk, sum eisini kann hava aðrar uppgávur fyri kommununa, t.d. trivnaðaruppgávur, móttøku.

Fyrimunir við kommunalum skipanum eru, at kommunan einsamøll kann leggja støðið fyri tænastum og veitingum, seta mál og leggja ætlanir fyri virksemið, soleiðis sum hon sær tørvin og møguleikarnar í kommununi. Hjá starvsfólkunum í kommunalu skipanunum eru størstu fyrimunirnir tryggar arbeiðsumstøður og støðugt fíggjarligt grundarlag aftur at umsitingarligum umhvørvi at virka í.

Ein kommunal skipan vendir sær natúrliga mest móti tørvi og áhugamálum hjá kommununi og tí útboði, økið hevur at bjóða, og leggur tí ikki natúrliga høvuðsdent á eftirspurningin og marknaðin. Og tær kommunalu skipanirnar, sum umframt at vera kunningardiskur eisini virka sum móttøka ella annað hjá kommununi, kunnu hava ilt við at skapa sær ein greiðan profil, neyðugar arbeiðsumstøður og annars at vera lætt atkomuligar hjá bæði ferðafólki og vinnuligu aktørunum. Hjá starvsfólki, ið sum partur av kommunalari umsiting burturav arbeiðir við ferðavinnumenning, eru umstøðurnar at hugsavna seg um at menna verkætlanir og mál, sum kommunan setur sær, betri – serliga har kunning og samskifti við aktørar og vitjandi er skipað afturat, eitt nú í samstarvi við ferðasmiðir og kunningarstovurnar í økinum.

Fleiri dømi eru um kommunalar kunningarstovur ella aðrar fyriskipanir beinleiðis undir kommununum:

- Í Runavík, Fuglafirði, Tvøroyri og Vági eru kunningarstovur skipaðar sum kommunalur stovnur við leiðara og partvíst eisini við øðrum starvsfólkum.

- Í Vestmanna, Eystur-, Sunda og Sjóvar kommunu eru starvsfólk sett at taka sær av ferðavinnuøkinum, umframt at tey eisini hava aðrar trivnaðar- og mentanaruppgávur fyri kommunurnar.

## Privat ella felagskommunal skipan

Privatar, lutvíst privatar og felagskommunalar skipanir eru ofta grundfestar í nógvum samfeldum almennum og privatum áhugamálum. Tær eru skipaðar sum sjálvsognarstovnar ella felagskommunal feløg, sum hava avtalur við fleiri ymiskar veitarar um fyriskipan, menning og kunning, og um at selja teirra vørur og tænastur. Áherðsla er løgd á eftirspurning eftir vørum og tænastum og vinning meira enn á onnur meira kommunupolitisk áhugamál, og gott samband er sum oftast við aktørarar á marknaðinum – hetta er tó eisini tongt at teimum avtalum, sum eru við kommunurnar um virksemi og fígging.

Tað, sum tó ofta ger seg galdandi á privatum og felagskommunalu kunningarstovunum, er, at orkan verður løgd í tær uppgávur, sum geva felagnum skjóta inntøku. Trupulleikin kann tí vera, at orkan til menning og kunning kann vera lítil. Ein annar trupulleiki, sum vísir seg, er, at fíggjarliga grundarlagið er neyvt tongt at tí nyttuvirði, ymisku aktørarnir í skipanini kenna seg fáa fyri stuðulin; hetta kann tí vera eitt ótrygt fíggjarligt grundarlag, eins og leiðslubygnaður og tilvísing ofta eru ógreið. Starvsfólkini kunnu kenna seg einsamøll, tí tey ikki eru partur av einum størri umsitingarligum umhvørvi.

Fleiri ymisk dømi um privatar ella felagskommunalar skipanir eru í Føroyum. Allar eru sprotnar úr lokalum tørvi við ymiskum fortreytum og eru tí skipaðar ymiskt:

- **Visit Tórshavn** verður rikið av Felagnum Tórshavn, sum er eitt felag fyri vanligar borgarar, handlar, matstovur og aðrar fyritøkur í Havn. Endamálið við felagnum er at skapa virksemi í býnum til frama fyri limirnar. Gongufelagið er ein partur av felagnum. Virksemið er tvíbýtt, har Visit Tórshavn hevur kunningarstovupartin, t.e. kunning, menning og marknaðarføring; City Tórshavn, undir Visit Tórshavn, skipar handilsliga virksemið hjá felagnum, sum er fíggjað við limagjaldi og øðrum inntøkum frá sølu, samskipan v.m. Leiðarin í City Tórshavn vísir til stjóran í Visit Tórshavn. Tórshavnar kommuna fíggjar Visit Tórshavn, altso kunningarstovupartin, við stuðulsjáttanum fyri avtalaðar uppgávur og avrik. Felagið Tórshavn er skipað við eini nevnd, ið umboðar kommununa og handils- og mentanarlívið í kommununi, sum setir stjóra, raðfestir virksemið og hevur yvirskipaða ábyrgd av stovninum.



- **Visit Norðoy og Visit Sandoy** eru millumkommunal feløg fyri ferðavinnu í avvarðandi økjum. Bæði hava kunningarstovur, sum kommunurnar fíggja við einum gjaldi pr. borgara í limakommununum. Feløgini eru skipað við eini nevnd, ið umboðar kommunur, vinnulív og mentan, sum setir stjóra, raðfestir virksemið og hevur yvirskipaða ábyrgd av stovninum.

- Við **Visit Vágar** hava kommunurnar í oynni í felag sett ein menningarleiðara, hvørs uppgáva er at menna, skipa og marknaðarføra Vágar og Mykines. Menningarleiðarin vísir til eina tvørkommunala samstarvsnevnd við tveimum umboðum úr hvørjari kommunu.

- **Nes** kommuna hevur gjørt avtalu við handilsfyritøkuna Navia um kunningardisk. Harumframt hevur kommunan sett eina nevnd, sum umboðar kommunu og vinnulív, at ráðgeva sær um ferðavinnu. Í **Skopun** er kunningardiskurin kommunalur, men heldur til í eini kaffistovu.

## Samanumtøka, verandi ferðavinnuskipanir og manning

| | Kommunal skipan | | Privat ella felagskommunal skipan | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Kunningarstovan** | *Partur av kommunuumsiting* | **Felagskommunal kunningarstova** | **Felagskommunal mennaraskipan** | **Sjálvsognarstovnur við kommunustuðli** | **Útveitt til privat** |
| **Tórshavn** | | | | | 9 ársverk | |
| **Norðoyggjar** | | | 4 ársverk | | | |
| **Runavík** | 2,5 ársverk | | | | | |
| **Nes** | | | | | | Útveitt til handil |
| **Fuglafjørður** | 1 ársverk | | | | | |
| **Eystur** | | 1 ársverk parttíð | | | | |
| **Sunda** | | 1 ársverk parttíð | | | | |
| **Vestmanna** | | 1 ársverk parttíð | | | | |
| **Vágar** | | | | 1,5 ársverk | | |
| **Sandoy** | | | 1,2 ársverk | | | |
| **Skopun** | 0,75 ársverk | | | | | |
| **Tvøroyri** | 1 ársverk | | | | | |
| **Vágur** | 1,5 ársverk | | | | | |
| **Sjóvar kommuna** | | 1 ársverk parttíð | | | | |

*Upplýsingarnar eru frá samrøðum við kommunurnar/kunningarstovurnar.*

## 3.3 Kostnaður

Í talvuni niðanfyri síggja vit, hvat kommunurnar hava brúkt beinleiðis til ferðavinnufyriskipan og menning í 2022, og hvat tær hava játtað í 2023 og 2024.

### Kommunur játta til ferðavinnu

| | Brúkt í 2022 | Játtað í 2023 | Játtað í 2024 |
|---|---|---|---|
| **Visit Tórshavn** | 3.460.000 | 3.550.000 | 3.660.000 |
| **Visit Nólsoy** | 380.000 | 400.000 | 400.000 |
| **Tórshavn annars** | 4.357.000 | 2.300.000 | 3.886.000 |
| **Tórshavn tilsamans** | 8.197.000 | 6.250.000 | 7.946.000 |
| **Vágur** | 1.400.000 | 1.240.000 | 1.485.000 |
| **Tvøroyri** | 683.300 | 1.125.500 | 965.600 |
| **Sandoy annars** | 527.000 | 850.000 | 1.100.000 |
| **Skopun** | – | – | – |
| **Vágar** | 800.000 | 1.032.000 | 1.326.000 |
| **Vestmanna** | 0 | 0 | 432.000 |
| **Sunda** | 356.600 | 600.000 | 300.000 |
| **Eiði** | 43.000 | 43.000 | 60.000 |
| **Fuglafjørður** | 812.000 | 798.000 | – |
| **Runavík** | 1.661.000 | 1.931.000 | 2.078.000 |
| **Nes** | 36.000 | 36.000 | 36.000 |
| **Eystur** | 300.000 | – | – |
| **Norðoyggjar** | 1.200.000 | 1.200.000 | 2.200.000 |
| | | | |
| **Tilsamans** | 16.015.900 | 15.105.500 | 16.928.500 |

*Upplýsingarnar eru frá kommununum beinleiðis. Har eingin tøl eru, hava vit antin ikki fingið endalig tøl, ella tey eru innbygdur partur av øðrum játtanum í kommununi.*

*'Upphæddin, kommunurnar samanlagt játta beinleiðis til ferðavinnu, er sambært upplýsingunum, sum vit hava fingið knapt 17 mió. kr. í 2024. Umframt upphæddirnar í talvuni brúka summar kommunur av øðrum játtanum til ferðavinnutongt virksemi t.d. á trivnaðar- og tekniska økinum, sum ikki ber til at eyðmerkja serstakt.'*

Einstøku upphæddirnar vísa okkum, at hóast onkur øki játta lutfalsliga nógv til ferðavinnu, eru summi øki so smá, at tað samanlagt kortini ikki verður ein stór játtan sæð í mun til kommunurnar samanlagt.

Landið játtar umleið 5,5 mió. kr. til innlendis ferðavinnumenning. Av hesum er upphæddin til verkætlanir, stuðul og rakstur góðar 3 mió. kr. Stuðulsupphæddin til almennar verkætlanir (tað, sum kunningarstovur og kommunur kunnu søkja um) hevur ligið um 700.000 kr. Aftur at tí er stuðul til Closed For Maintenance, skelting, kunnandi tilfar (t.d. økiskort), heimasíðuplattformur umframt stuðul til útvaldar samstarvsverkætlanir, eitt nú verkætlanir, sum VFI hevur saman við øðrum myndugleikum (Landsverki, SSL, Umhvørvisstovuni, kommunum v.m.).

Oftast verður stuðul veittur eftir krónu fyri krónu meginregluni, t.e. at kommunurnar í minsta lagi rinda helvtina sjálvar. Viðhvørt verður stuðulin markaður til ávís átøk, t.d. til gøtur. Harumframt verða krøv sett um góðsku, lokalar veitingar o.a.

*'VFI metir, at tað ber til at gera stuðulsskipanina øðrvísi og meiri skipað, t.d. eftir eini menningarætlan, sum land og kommunur frammanundan eru vorðin samd um at fíggja í felag. Hetta er eisini tað, sum onkur av starvsfólkunum í kunningarstovunum, sum vit hava tosað við, siga.'*

## 3.4 Samanumtøka, verandi virksemi í kommununum

Til ber at býta virksemið hjá kommununum í tríggjar høvuðsfunktiónir: Menning, tænastu og kunning.

Kommunurnar hava skipað seg ymiskt viðvíkjandi ferðavinnu. Alment kunnu vit siga, at talan er um smáar umsitingareindir við nógvari útskifting í starvsfólkahópinum. Hettar ger tað trupult at skapa trivnað og kontinuitet. Hesin bágin sær út til at vera uttan mun til, um skipanin er kommunal, felagskommunal ella privat.

Vit hava bert yvirskipað og landsfevnandi hagtøl fyri ferðavinnu í Føroyum. Tí hevur ikki borið til at greina neyvt, hvussu ferðavinnan ávirkar ymisk øki og kommunur í

landinum. Vit hava í staðin gjørt eina lýsing av bygnaði, uppgávum og játtanum við støði í samrøðum við nakrar kunningarstovur og kommunur og annars íkast og upplýsingar frá tilvísingarbólkinum.

*'Samrøður geva okkum tó ábendingar um, at kommunalu skipanirnar geva eitt ávíst støðufesti, trygg setanarviðurskifti og frið um uppgávurnar, m.a. tí at atgongd er til hjálparfunktiónir í kommununum og eitt umsitingarligt umhvørvi.'*



Privatu og felagskommunalu kunningarstovurnar eru meira merktar av einum fíggjarligum grundarlagið, ið er tongt at tí nyttuvirði, ymisku aktørarnir í skipanini kenna seg fáa fyri stuðulin; hetta kann tí vera eitt ótrygt fíggjarligt grundarlag, eins og leiðslubygnaður og tilvísing ofta eru ógreið. Starvsfólkini kunnu kenna seg einsamøll, tí tey ikki eru partur av einum størri umsitingarligum umhvørvi. Hetta setir krøv til nevndirnar, ið varða av.

Økini uttan fyri høvuðsstaðarøkið hava tað yvirhøvur tyngri bæði fíggjarliga og umsitingarliga, eisini tí at fáir fyriskiparar og veitarar eru at lyfta menningar- og kunningaruppgávurnar saman við kunningarstovunum og samskiparunum, og umsitingareindirnar eru í sjálvum sær fámentari.

*'Hóast upphæddin, ið verður játtað til innlendis ferðavinnu tilsamans, tykist stór, so er hon smábýtt á fleiri øki, og eingin miðvís ætlan tykist at vera fyri menning móti felags málum í kommunalum høpi. Hetta hugsa bæði VFI og starvsfólk í ferðavinnuni kann samskipast betur, soleiðis at meira samanlagt fæst burturúr.'*

# 4. Uppskot til batar og broytingar

## 4.1 Sterkari kommunalur grundvøllur

### Kommunur sum myndugleiki

Sum lýst omanfyri, so er sera ymiskt, hvussu kommunurnar í dag raðfesta og skipa seg viðvíkjandi ferðavinnu. Summar kommunur hava – einsæris ella í felag – skipað kunningarstovur, og aðrar hava sett fólk í starv at standa fyri ferðavinnumenning. Aftur aðrar kommunur hava valt einki at gera við ferðavinnu. Allar kommunur hava tó ábyrgd av at skipa tryggar karmar og skilhald í sínum landafrøðiliga øki – eisini viðvíkjandi ferðavinnuvirkseminum í økinum.

Skal kommunali grundvøllurin í sambandi við ferðavinnu styrkjast í øllum landinum, eiga kommunurnar tí sum minstamark at kenna og styrkja myndugleikauppgávur sínar viðvíkjandi ferðavinnu, men neyðugt er eisini at geva kommununum fleiri amboð at útinna myndugleikan við, t.d. rættin til at taka gjald frá ferðavinnuveitarum og vitjandi fyri kommunalar tænastur, so sum parkering, vatn, ruskmóttøku v.m.

Sum útgangsstøði kunnu vit siga, at kommunurnar sum býarskipanarmyndugleiki[1] skulu skipa virksemið í kommununi – herundir eisini ferðavinnuvirksemi og virksemi tvørtur um kommunumørk, í tann mun tørvur er á tí.[2]

Framhaldandi kunnu vit siga, at sum umhvørvis-, vega- og tilbúgvingarmyndugleiki á staðnum skulu kommunurnar – einsæris ella saman – skipa greiðar og tryggar karmar og skilhald í kommununi – eisini í sambandi við ferðavinnu. Tað merkir, at kommunurnar – sama um tær hava raðfest ferðavinnu sum kommunalt átaksøki ella ikki – sjálvar, ella saman við viðkomandi borgarum, ognarum og ferðavinnuaktørum í kommununi, hava ábyrgd av at taka stig til:

---

1 Løgtingslóg um býarskipan og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

2 Til at ráðgera, um býarskipanir fyri eitt øki, ið umfatar fleiri kommunur, kunnu verða samskipaðar, kann landsstýrismaðurin sambært lógini seta nevnd, ið skal vera kommunustýrinum til hjálpar í arbeiðinum við at fáa býarskipan í lag fyri økið alt.

- At skipa umstøður fyri, at ferðavinnuvirksemið, sum er í kommununi, er skipað og trygt.
- At skelti og upplýsingar um upplivingar, tænastur og farleiðir á kommunalum økjum eru greið, røtt og dagførd.
- At kunning um viðkomandi viðurskifti, so sum vatngóðska, vandamikil viðurskifti t.d. í strandaøkjum, haga, vinnuøkjum, bygdagøtur v.m. eru sjónlig, greið og skillig fyri vitjandi.
- At verja lokala mentan, trivnaðin og privatlívið hjá borgarum, t.d. við at skipa ferðing og atburð í viðkvæmum og privatum økjum.
- Saman við viðkomandi myndugleikum at verja náttúru, djóralív, fornminni og onnur tjóðarvirði.
- At skipa vegir, parkering og skelting, so at ferðslan, sum m.a. stendst av ferðavinnuni í kommununi, ikki er til bága ella vanda fyri fólk, annað virksemi og trygd.
- At grundleggjandi tænastur, so sum ruskmóttøka, reint vatn og vesi, eru hóskilig.

Ein avbjóðing er, tá ið ferðavinnufyriskiparar skipa sítt vinnuliga virksemi aðrastaðni frá, uttan at samband er við viðkomandi kommunalu myndugleikar og lokalar aktørar. Talan kann verða um lutfalsliga stórar útreiðslur hjá kommununum, uttan at samsvarandi inntøkur liggja eftir í økjunum, m.a. tí heimildir at taka gjøld fyri tænastur ikki eru skipaðar nøktandi.

Neyðugt er við lóg at geva kommununum fleiri amboð at útinna sín myndugleika, t.d. rættin til á skipaðan hátt at taka gjald fyri tænastur so sum parkering, vatn, ruskmóttøku v.m. frá ferðavinnufyriskiparum og -veitarum, ella beinleiðis frá ferðafólki og vitjandi. Kommunur við serstøkum atdráttum eiga harumframt at fáa fíggjarligan stuðul at skipa viðurskiftini á staðnum, soleiðis at bæði lokalu íbúgvarnir og vitjandi hava góðar og tryggar umstøður.

## Kommunur sum vinnumennarar

Kommunurnar hava ábyrgd av at røkja kommunalu myndugleikauppgávurnar, men gera sjálvar av, hvat og hvussu tær annars best skipa seg viðvíkjandi ferðavinnu, so leingi sum talan ikki er um at taka beinleiðis lut í vinnuligum virksemi.[3]

Kommunur kunnu seta almenn tiltøk og karmar í verk, um so er, at hetta er til frama fyri vinnulívið á staðnum, men stuðul til einstaklingar ella einstakt virksemi er ikki loyvdur.[4]

3 Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, § 50, stk 1.

4 Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, § 50, stk 2.

## 4.2 Samskipa ferðavinnuætlanir og -átøk

Flestu kunningarstovur, ið vit hava tosað við í sambandi við hetta arbeiðið, eru á einum máli um, at okkum vantar veruliga orku at samskipa ferðavinnuna – bæði í økjum og fyri landið alt. Hetta síggja vit eisini aftur í mangan smábýttu játtanunum í fleiri økjum, sum hóast stórar í mun til borgarar í kommununum ella økjunum, samanlagt ikki røkka so langt út um dagliga umsiting í kommununi ella økinum sjálvum (sí part 3.3).

Fleiri royndir eru gjørdar at fáa í lag økissamstørv um átøk og uppgávur í sambandi við ferðavinnu, men tað hevur ikki eydnast á nøktandi hátt, m.a. tí samstarvsviljin ikki er um ferðavinnu millum kommunur, og/ella tí neyðuga fyrisitingarliga og fíggjarliga orkan ikki verður sett av til tað.

Menningardeildin á VFI hevur ein samskipandi leiklut og stendur fyri landsfevnandi menningarátøkum í ferðavinnuni. Menningardeildin hevur bygt upp og umsitur stuðulsfunktiónir, sum eru tøkar hjá kunningarstovum og kommunum at brúka.

> *'VFI hevur tó ikki heimildir at virka beinleiðis í lokaløkjunum; ein fortreyt er tí, at VFI og lokali myndugleikin samstarva um ætlanir og menningarátøk, og at lokali myndugleikin eisini raðfestir ferðavinnumenning – tað veri seg við starvsfólkaorku og/ella fígging.'*

Umboðini í tilvísingarbólkinum eru samd um, at okkum tørvar effektivari og miðvísari menningartilgongd við ítøkiligum átøkum, ið er væl kjølfest í skipaðum samstarvi millum kommunur og millum land og kommunur. Við støði í eini felags yvirskipaðari ferðavinnuætlan og málum, sum hava undirtøku frá bæði landi og kommunum, hevði borið til at brúkt bæði stuðulsupphæddina hjá VFI og kommunalu játtanirnar miðvísari og meiri skipað.

- Vit mæla tí til, at kommunurnar í fyrsta lagi saman við borgarum, ognarum og aktørum í vinnuni gera sínar ætlanir fyri ferðavinnu í kommununi/økinum. At kommunurnar síðani skipa seg í eitt politiskt og fyrisitingarligt samstarv undir Kommunufelagnum, har tær saman seta út í kortið og raðfesta, hvørji menningarátøk í ferðavinnuni samanlagt eiga at vera gjørd.

- Næsta stigið eigur at vera skipað samstarv við Visit Faroe Islands við tí endamáli at samskipa ætlanir, mál og raðfestingar hjá landinum og kommununum. Úrslitið eigur at vera ein felags yvirskipað ferðavinnuætlan, ið ítøkiliga raðfestir, hvørji menningarátøk skulu setast í verk kring landið, og hvussu tey skulu fíggjast.



## 4.3 Uppgávu- og ábyrgdarbýtið

Vit kunnu tí bygnaðarliga hugsa okkum ferðavinnumenningina býtta í trý stig: land, ein felags samskipandi menningartilgongd umboðandi kommunur og land, og kommunurnar.

### Trý menningarstig í ferðavinnufyrisiting

| | | |
|---|---|---|
| Land | → | . Skipa ferðavinnu og atknýttar myndugleikauppgávur og amboð at fremja tær í lóg.<br>. Skapa strategiska heild, visuellan samanhang og marknaðarføra.<br>. Fyriskipa og umsita fíggjarligan stuðul til ferðavinnumenning. |
| Felags tilgongd í KF og VFI | → | . Samskipa kommunalar ferðavinnuætlanir og mál.<br>. Samskipa ætlanir, mál og raðfestingar hjá landi og kommunum.<br>. Raðfesta menningarátøk kring landið. |
| Kommunur | → | . Tryggja trivnað, skilhald og trygd.<br>. Menna ferðavinnuætlanir og karmar um aktørar og tænastur.<br>. Kunna um tænastur og upplivingar.<br>. Fyriskipa kommunal tiltøk og átøk. |

## 4.4 Fígging

Sum lýst í parti 3,3 játta kommunur í 2024 tilsamans góðar 17 mió. kr. til ferðavinnuendamál, umframt annað, sum verður játtað á øðrum økjum, sum óbeinleiðis stuðlar ferðavinnu, t.d. á tekniska og trivnaðarøkinum. Kommunalu játtanirnar eru smábýttar á ymisku økini í landinum uttan í høvuðsstaðarkommununi, sum játtar góða helvt av allari upphæddini – tó at játtanin í mun til íbúgvatalið her er lakari enn í fleiri økjum.

Játtanin hjá landinum til innlendis menning er í 2024 5,5 mió. kr., av hesum er upphæddin til verkætlanir, stuðul og rakstur 3. mió kr., harav umleið 700.000 kr. er stuðul, sum kommunurnar kunnu søkja um, og sum verður veittur eftir krónu fyri krónu meginregluni, t.e. at kommunurnar í minsta lagi rinda helvtina.

- *Tað er tí í høvuðsheitum tær kommunur, sum frammanundan raðfesta ferðavinnumenning, sum eisini fáa stuðul frá landinum. Hesa íbygdu eggjan eiga vit at varðveita í skipanini, tó at vit í størri mun eisini eiga at eggja til sammenning í økjum við í størri mun at leggja upp til at stuðla samstarvsverkætlanum tvørtur um kommunumørkini.*

Eyðkenni við verandi stuðulsskipan er eisini, at upphæddirnar eru smáar í mun til tørvin, sum er.

- *Vit halda, at meiri peningur má koma í stuðulsskipanina, skal hon gera nakran veruligan mun. At fíggja hetta mæla vit til, at ferðavinnugjaldið á ferðafólk, sum koma til landið, óskerdur fer til at menna og skipa ferðavinnuna.*

Endamálið er í fyrsta lagi, at ferðafólkini gjalda ein part av ferðavinnumenningini – serliga tann partin, ið snýr seg um at menna og verja náttúru og lokalumhvørvi.

Í øðrum lagi er endamálið at býta inntøkurnar frá ferðavinnu javnari og stuðla menning í økjum, har náttúruupplivingar o.a. minni inntøkugevandi virksemi fer fram, sum er av alstórum týdningi fyri vinnumøguleikarnar hjá øllum ferðavinnuveitarunum.

- *Vit mæla tí eisini til, at stuðulin til ferðavinnumenning í størri mun enn nú verður endamálsstýrdur við støði í eini innlendis menningarætlan við tí fyri eygað at miða eftir menningini og loysa nakrar av ítøkiligu avbjóðingunum í ferðavinnuni.*



. *Vit mæla sum útgangsstøði til at varðveita krónu fyri krónu meginregluna fyri stuðul frá landinum til átøk í kommununum, men at tað eisini við støði í eini felags innlendis ferðavinnuætlan skal bera til at eyðmerkja ein part av stuðlinum til:*

- Serstøk ferðamál í landinum.
- Serstøk ferðavinnuevni/-tema – í økjum ella fyri landið alt.
- Samstarvsfremjandi verkætlanir tvørtur um kommunumørk, har tað gevur meining.

## 4.5 Samanumtikið um batar og broytingar

Tað er ymiskt, hvønn tørv kommunur hava at skipa seg í sambandi við ferðavinnu. Tað er tí eisini ymiskt, hvussu tær hava skipað seg higartil. Har kommunur hava valt at samstarva, er eisini ymiskt, hvussu samstørvini eru skipað, hvussu víðfevnd tey eru, og hvussu tey rigga. Tað er eisini ymiskt, hvussu kommunur raðfesta ferðavinnu. Tí er trupult at finna ein felags kommunalan leist at skipa ferðavinnu, skal kommunala sjálvræðið framhaldandi hava innihald, og virksemið spretta úr lokala jørðildinum – til tess krevst, at frælsi framhaldandi er til at raðfesta og skipa seg í mun til tørv og ynski á staðnum.

Tó eru myndugleikauppgávur, sum kommunur – einsæris ella saman – hava skyldu til at røkja, og í økjum við nógvum ferðavinnuvirksemi eru hesar uppgávur viðvíkjandi ferðavinnu meira áleikandi enn í økjum við minni virksemi. Neyðugt er, at kommunurnar fáa røttu amboðini at røkja hesar uppgávur munagott.

Er ferðavinna í økinum, eigur kommunan í politisku raðfesting síni at skipa karmar, so aktørar í økinum kunnu mennast og virka dygdargott. Hetta kann vera ein stór uppgáva hjá summum kommunum at røkja einsamallar.

Tá ið vit í hesum arbeiði hava umrøtt arbeiðsuppgávur, menning og møguleikar fyri framburði við kunningarstovur og starvsfólk í vinnuni, eru fleiri á einum máli um, at okkurt slag av samskapan og heild skal til, skal lokala menningin veruliga bera á mál og starvsfólk trívast í teimum skipanum, sum eru.

Heldur enn at noyða kommunur at samstarva eftir læstum leisti halda vit, at kommunurnar eiga at skipa seg í eitt politiskt og fyrisitingarligt samstarv undir Kommunufelagnum, har tær samskipa sínar lokalu ferðavinnuætlanir og mál – og saman seta út í kortið og raðfesta, hvørji menningarátøk samanlagt eiga at verða raðfest og ment lokalt og millum øki; og at eitt skipað samstarv eigur at vera við innlendis menningardeildina í VFI um ferðavinnumenning og stuðulsjáttanina.

